# Virðini liggja í orginalum og ikki í kopium

**BYGDASTEVNA** - Fyrimyndirnar kunnu vera nógvar, men tað týdningarmiklasta at leggja sær í geyma er, at virðini liggja ikki í kopiunum, men í orginalunum - og Føroyar hava fostrað nógvar orginalar, segði Kári P. Højgaard, tá hann helt røðu á bygdastevnuni á Skála leygardagin



**BEDING**

*- Møguleikarnir eru framhaldandi góðir, og vónandi verður onkur av teimum stóru ætlanunum um skipabygging fyri fleiri 100-tals miljónir veruleiki á Skála í nærmastu framtíð, segði løgtingsmaðurin, Kári P. Højgaard, í røðu síni*

Vilmund Jacobsen

Í vikuskiftinum varð bygdarstevna hildin á Skála, og tað var Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, sum fekk heiðurin at halda røðu á stevnuni. Kári kann vera bæði álvarsamur og skemtiligur, og hendan dagin á Skála upplivdu áhoyrarar eitt sindur av hvørjum frá løgtingsmanninum.

- Eg havi fingið fleiri afturmeldingar um, at fólk dámdu røðu mína, sum bæði var til gamans og álvara, sigur ein væl upplagdur Kári P. Højgaard.

### Drúgvir í kappróðri

- Vit fegnast í hesum døgum um, at náttúran aftur vaknar úr dvala, og vit skoða við spenningi og væntan fram móti ljósari tíðum, har sól og summar, lomb og ljóðkátir fuglaflokkar fara at ríka okkara gerandisdag. Hóast hvør árstíð hevur sína egnu sermerktu "sjarmu", er tað hugaligt at møta vár-og summarhálvuni.

Løgtingsmaðurin vísti á, at við summarinum koma stevnurnar, og skálastevnan er fyrsta summarstevnan á árinum.

Hann rósti fólkinum í økinum fyri at duga væl at skipa fyri, tó at kappróðurin, sum eisini var á bygdarstevnuni hendan dagin, ikki telir við í FM-róðrinum.

- Hóast fólkatalið í bygdunum, Skála og Skálafirði, bert telur stívliga 700 fólk, so hava tit ítróttarliga megnað at nátt sera góðum úrslitum, bæði í kappróðri, hond-og fótbólti. Eg minnist, tá kappróðurin tók seg upp, og vit á eystara armi á Skálafjørðinum høvdu fingið fingið Sølmund. Eitt longri tíðarskeið gekst ikki so væl í hond, og úrslitini vóru vánalig hóast dúgliga varð vant. Til endans varð niðurstøðan, at báturin var skeivur og kundi ikki vinna. Hann bleiv so læntur út til Skála, og nú bar betur til. Minnist eg rætt, vunnu skálamenn fleiri róðrar við Sølmundi.

Kári P. Højgaard vísti á, at kappróðrarbáturin Svanur eisini hevur megnað at vunnið FM-heitið, einaferð við kvinnum og fimm ferðir við dreingjum.

- Øll tilkomin fólk, sum hava fylgt við kappróðri, minnast til góðu úrslitini hjá Skálabátinum, ið varð føroyameistari trý ár á rað og hevur bestu tíð nakrantíð hjá 10 mannafórum á ólavsøku, legði hann aftrat.

### Ung elska luksus

Løgtingsmaðurin vísti á, at tað at seta hvørjum stevnu hevur verið vanligt í fólki okkara. Fyrr rørdu fólk seg meiri, enn gjørt verður í dag og hentleikarnir, ið vit rokna sum eina sjálvfylgju, vóru ókendir. Gerandisdagurin var merktur av nógvum og tungum likamligum arbeiði allar seks gerandisdagarnar í vikuni, men sunnudagurin varð hildin heilagur.

- Tí var tað mest til tær stóru hátíðirnar, at fólk savnaðust til hugna og til at halda sær at gaman. Hóast lívið var strævið, so høvdu fólk tíð til hvønn annan, vitjaðu inn á gólvið hjá hvørjum øðrum, og eisini var neyðugt í størri mun enn í dag at samstarva.

Hann vísti á, at vit verða ávirkað av teimum umstøðum, vit liva undir og teimum fólkum, vit dagliga liva saman við.

- Burtursæð frá teimum broyttu sjónligu matrialistisku ágóðunum, eri eg vísur í, at eitt nú ungdómurin ikki var so nógv øðrvísi fyrr, enn hann er nú.

"Tey ungu í dag elska luksus. Tey hava óvanar. Virða ikki eldri fólk. Tosa, tá tey skulu arbeiða. Tey svara foreldrum aftur. Larma til veitslur. Duga ikki borðsið, og tey eru óláta við sínar lærarar..."

Eftir at hava sagt hetta, spurdi Kári P. Højgaard út í fjøldina, um fólk kenna nakrar av hesum útsagnum aftur.

- Onkur heldur møguliga, at eg nú havi tosað við Hans Jákup Andreassen, skúlastjóra – ella, at tað er Jógvan E. Ósá, sum hevur sagt hetta í seinastu sendingini av Álvaratos. Men nei, so er ikki. Veruleikin er, at hesa útsøgn um ungdóm sá eg á eini powerpoint-framløgu hjá elstu dóttur míni, ið arbeiðir sum sálarfrøðingur, tá hon seinastu viku helt ein fyrilestur í Løkshøll. Tað var eingin annar enn góði gamli Sokrates, sum segði hesi orðini fyri umleið 2500 árum síðani.

Síðan reisti Kári spurningin, hvussu fólk kláraðu seg áðrenn internet, fartelefon og facebook?

- Teldubrøv eru hjá móttakaranum í somu løtu, tey verða send. Jú, sanniliga er munur á nútímans e-mail og tí vanliga gamla samskiftinum við frímerki og stempli. Tí hevur Posta eisini stórar trupuleikar við at klára seg í kappingini.

Hann vísti á, at á facebook fæst alt at vita, og úrvalið er fjølbroytt - alt frá tí einkisigandi, at nú hevur onkur drukkið kaffi og ætlar sær til songar, til stórtíðindi, at nú er hann ella hon er vorðin "single".

### Óli P og Sosialurin

- Í loftmiðlunum er kappingin innan politisku branchuna hørð. Kvinnur og menn einsæris ella í flokki kappast um at koma við onkrari kontroversiellari útsøgn fyri at sleppa á skíggjan ella í lurti. Somuleiðis eru bløðini fylt við lesarabrøvum og meiningum, tí hesin bólkur hevur ein serstakan tørv í skrift og talu at minna fólk á, at vit eru til.

Kári P. Højgaard helt fyri, at tað tó er ein persónur, sum við sínum fáu strikum og orðum megnar tað, sum eingin annar megnar.

- Hetta er Óli Petersen, sum á serstaka skemtiligan hátt dugir at seta fokus á samfelagsspurningar og dugir at livandigera persónar, sum á ein ella annan hátt hava skilt seg burtur úr mongdini. At Sosialurin hevur klárað seg so væl í føroyska blaðheiminum, er ikki minst tekningunum á baksíðini hjá Óla P. fyri at takka.

Kári P. Højgaard vísti í hesum sambandi á, at allir mentaðir býir við virðing fyri sær sjálvum og søguni, reisa minnisvarðar í samband við hendingar - ella til at heiðra og minnast ein av sínum borgarum sum onkursvegna hava skarað framúr og avrikað nakað serstakt.

- Klaksvík hevur nógvar standmyndir og minnismerkir, og uppaftur fleiri síggja vit í Tórshavn. Serliga vøkur er bronsustandmyndin av traðarmanninum, sum Hans Pauli Olsen hevur gjørt. Hon er reist til minnis um teir menn, sum við hørðum sliti dyrkaðu traðirnar og røktu jørðina.

Sum ein av borgarunum í Runavíkar kommunu, sum eisini fevnir um gomlu Skála kommunu, minti Kári á, at hetta er triðstørsta kommuna í landinum.

- Er tað tí ikki eitt framúr gott hugskot til okkara fólkavalda kommunala býráð, at ein minnisvarði stoyptur úr bronsju og í fullari stødd verður reistur á Skála av okkara besta og virknasta skemtiteknara nakrantíð - Óla Petersen?

Skemtiligur, sum løgtingsmaðurin kann vera, helt hann í sama viðfangi fyri, at í hesum hesum sparitíðum og við dýrari bronsju kundi eitt munandi bíligari alternativ verið, um standmyndin í staðin avmyndaði Kára Johannesen, seinasta borgarstjóra í fyrrverandi Skála kommunu.

### Arbeiðsgrev av manni

Í røðu síni hugleiddi Kári P. Højgaard víðari og segði, at vanliga gjørdu tey eldru lítið hóvasták burturúr, tá tey høvdu avrikað nakað útyvir tað vanliga, men tey vóru kortini eins fegin tá, sum vit eru tað í dag um eitthvørt, sum varð sagt ella gjørt, fekk viðurkenning.

- Og tó; okkurt undantak er, legði hann aftrat.

Løgtingsmaðuri segði seg minnast eina stak áhugaverda "Meg minnist-sending" í Útvarpinum, tá Niels Juul Arge, útvarpsstjóri, fyri nógvum árum síðani vitjaði inni á gólvinum hjá abbabeiggja Símuni Højgaard, sum vaks upp í Rituvík og seinri búsettist á Skála.

- Símun dugdi meistarliga væl og livandi at siga frá lívssøgu síni, og eg gleddist um at verða so nær skyldur við hendan mann, sum megnaði at arbeiða seg upp til at verða skipari, reiðari og seinni størsti óðalsmaður í Føroyum. Hann var eitt grev at arbeiða og tað, sum eg serliga minnist úr hesi sending var, tá hann greiddi útvarpsmanninum frá fyrstu ferðini, hann fór í bøin á Skála at sláa. Jú, segði hann, at "tað vóru allir skálamenn samdir um, at slíkan sløttumann høvdu teir ikki sæð fyrr..."

Kári P. Højgaard vísti á, at øll menniskju hava fingið sína talent, men tíbetur hava ikki øll fingið ta somu, og ymiskt er, hvussu talentin verður viðfarin.

- Myndlist og skapandi handverk hava altíð bergtikið, tá hugflog og evni ganga upp í eina hægri eind, tá tað sum eyga listamansins sær, og andin nemur, kann skapast ella festast á løriftið og gerast til eina varandi mynd, sum menniskju hugtikin líta at og undrast yvir,